FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 27. okt. 2021
J. nr.: 21/21450

Svar til fyrispurning 52-059/2021 frá Una Rasmussen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um hædd er tikin fyri blindum og sjónveikum í nýggju bíleggingarskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins

Fyrispurningurin er soljóðandi:

- *Eru ætlanir um at gera tað møguligt hjá blindum og sjónveikum at bíleggja í nýggju bíleggingarskipanini hjá Strandfaraskipum Landsins?*

Svar

Strandfaraskip Landsins hevur, sum partur av menningartilgongdini viðvíkjandi nýggju bíleggingarskipanini til ferðafólk og akfør, sent umbøn til Sjóndepilin um ráðgeving í mun til tørvin hjá sjónveikum og blindum og tilvísing til brúkarar, ið seinni kunnu luttaka í royndarkoyring (test) av skipanini. Harumframt upplýsir Strandferðslan, at hon fær ráðgeving frá kt – mennara, ið áður hevur ment skipanir, ið taka atlit til serliga tørvin hjá fólkið, ið bera brek.

Høvuðsendamál hjá Strandferðsluni er at veita somu tænastu til allar borgarar í landinum og at allar skipanir, ið geva borgarum atgongd til hesar, í mest møguligan mun eisini taka atlit til tørvin hjá fólkið, ið bera brek.

Strandferðslan hevur eitt gott samstarv við Megd og hevur áður biðið um ráðgeving og eftirmetingar, eitt nú í sambandi við útbjóðing av bygdaleiðum og byggingina av Erlu Kongsdóttir.

Tinganes, 27. oktobur 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum